

Mynd: BP

# Heimsbankin trýr ikki at oljuprísurin hækkar í 2016

**Jógvan Hugo Gardar**

25.10.2015 - 20:05

Oljan.fo

Heimsbankin hevur skorið tíggju dollarar av síni meting av oljuprisinum í 2016. Hetta stendur at lesa í fesku fragreiðingini um ravørumarknaðiní samband við úrslitið hjá bankanum fyri triðja ársfjórðing.

Í juli metti Heimsbankin at oljuprisurin fór at liggja um 61 dollarar fyri fatið í 2016, men nú sigur bankin at hetta helst ikki verður meir enn 51 dollarar.

Samstundis niðurskrivar bankin sína meting fyri meðalprísin í 2015, úr 57 dollarum til 52 dollarar fyri fatið.

Orsøkin til at Heimsbankin hevur broytt metingina, og lækka metingini, er at tað er stór óvissa um nær javnvág aftur kemur í oljumarknaðin, tað vil siga millum útboð og eftirspurning.